Vikuskiftis Sosialurin



# Eg eri grønlendingur og ein partur av heiminum

**Rasmus Lyberth hevur ferðast kring allan heimin og bergtikið áhoyrarar við sínum livandi framførslum og fantastisku rødd. Sosialurin hitti Rasmus Lyberth seinnapartin hósdagin til eitt prát um grønlendskan tónleik, globalisering, Muhammed-tekningar, forvitni og framførsluna á Jóansøkufestivalinum**

JÓANSØKUFESTIVAL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.do*

Rasmus Lyberth hevur í nógv nógv ár framført og bergtikið fólk við sínum tónleiki og sangi. Hann er, uttan at taka munnin ov fullan, tað størsta grønlendska tónleikanavnið nakrantíð. Men hvat er tað, sum hevur gjørt, at Rasmus hevur megnað at hugtikið fólk líkamikið hvar hann hevur verið?

– Eg eri av natúr eitt ógvuliga forvitið menniskja, og tað er hetta forvitnið, sum hevur verið tað berandi í mínum tónleiki. Eg spyrji alla tíðina, og leiti alla tíðina eftir svarum. Tá eg framføri, so er tað ikki ein liðug vøra eg gevi áhoyrarunum, men eg arbeiði við teimum og teirra kenslum alla tíðina meðan framførslan er. Tí er tað eisini, at fólkini siga huff og anda djúpt nakrar ferðir, aftaná eg havi verið á palli, greiðir Rasmus Lyberth frá.

### Heimsborgari

Hetta forvitni Rasmus Lyberth er inni á, er tað sama, sum ger, at hann eisini kennir seg sum ein grønlendskan heimsborgara. – Eg havi altíð kent meg sum ein part av heiminum, altíð. Eg kenni meg avgjørt eisini sum grønlending, men ikki bara sum grønlending. Men eg vil fegin fortelja tykkum øllum, at eg eri grønlendingur, og tað má gjarna hoyrast, sigur Rasmus Lyberth frá.

– Eg skrivi um tað, sum nú einaferð nertur mínar hjartastreingir. Soleiðis fortelji eg um mín heim. Ikki bara um meg sum grønlending, men sum heimsborgara, og tað haldi eg er týdningarmikið. Vit mugu altíð minnast, at alt tað, vit einaferð gera ávirkar onnur, um vit vilja tað ella ikki. Alt tað, sum tú og eg gera hevur ávirkan onkrastaðni, og tað mugu vit vera tilvitaði um.



*Rasmus Lybert skal framføra á Jóansøkufestivalinum* *Mynd: Jens Kr Vang*

Eitt tað besta dømi um tað, er Muhammedstekningarnar í Danmark herfyri. Ongin í Danmark hevði ímyndað sær, at tekningarnar fóru at fáa so ógvusligar avleiðingar. Men orsøkin til, at avleiðingarnar vóru so umfatandi, er, at tey ikki vóru tilvitaði um, at tað fór at hava ávirkan aðrastaðni enn í lítla Danmark.

Og júst til Danmarkar er tað, at Rasmus Lyberth er fluttur til í hesum døgum. – Ja, eg flutti til Danmarkar mikudagin. So henda Føroyaferðin er hin fyrsta ferðin úr mínum nýggja landi, heldur Rasmus Lyberth skemtandi fyri. Rasmus Lyberth hevur valt at flyta til Danmarkar fyri at kunna brúka mest møguliga tíð upp á tónleik, tað sum eftir er av hansara yrkisleið. Tí, sum hann sigur, so nærkast hann teimum 55 alvorliga, og tí má hann seta seg til sættis við, at hann ikki hevur nógv ár eftir á toppinum.

Tíðina, sum eftir er, vil hann brúka saman við góðum tónleikarum, soleiðis at hann fær mest møguligt burtur úr.

### Sálina við

Sum áður sagt, so er Rasmus tað størsta grønlendska tónleikaranavnið nakrantíð. Men aðrir kendir ella hálvkendir grønlendskir tónleikarar eru eisini, sum vanligi føroyingurin kennir til. Julie Berthelsen, sum luttók í Stjerne for en Aften, er grønlendsk, og henni dámar Rasmus Lyberth væl.

– Eg haldi at hon, og fleiri at teimum ungu grønlendsku tónleikarunum við henni, eru sera dugnaligir tónleikarar. Nú er tað ikki so, at eg fylgi teimum dagliga, men mín vanliga uppfatan er, at tey eru sera dugnalig. Tað einasta tey mugu ansa eftir er, at tey ikki fella í pengafelluna, og verða ein partur av einum plátufelagið, sum fortelur teimum, hvat tað er tey skulu framføra og spæla. Sálin skal altíð vera við, staðfestir Rasmus Lyberth.

Akkurát hvussu týdningarmikil sálin er, fært tú eitt tað besta dømi úr tónleikinum hjá Rasmus Lyberth. Hann syngur jú eina rúgvu á grønlendskum, og hóast vit ikki skilja tað allar minsta av tekstinum, so fangar tað kortini. Tað er tí sálin er við.

– Eg lurti og dámi sera væl enskan og føroyskan tónleik, men eg skilji onki av tí. Men sálin er við, og tí verður tað gott, líkamikið um tú skilir tekstin ella ikki.

### Framførsla í heimsflokki

Tí hava festivalluttakarar í Suðuroy heldur onki at stúra fyri í annaðkvøld. Rasmus Lyberth hevur altíð sálina við, og tí torir hann at lova eina framførslu í heimsflokki, og frálíkan tónleik eisini. Við sær á pallinum hevur Rasmus Lyberth Christian Søgård, og er konsertferðin teir nú eru á, eitt slag av 30 ára jubileum fyri teirra samstarvi.

**Skúlin á Velbastað**
Norðuri á Heyggi 19
176 Velbastaður
Tlf. 302505 - 228607 · Fax 302506

## Lærarastarv í Skúlanum á Velbastað

**skúlin liggur í Miðheiminum. Bert 10 min. úr Havn heim til Velbastaðar!**

Søkt verður eftir einum lærara til fast starv skúlaárið 2006/2007.

**Tann, ið settur verður skal:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- vera fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru á skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan
- kunna undirvísa fleirflokkað og næmingatillagað

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambart sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum **18.1 – 27.4**

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 7. juli kl. 16.00**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Manbjørn Mortensen, skúlaleiðara á tlf. 302505 ella 228607

Skúlin á Velbastað er ein 4 flokkaður skúli við undirvísing í 1.-7. árgang. Komandi skúlaár verða 5 lærarar og 49 næmingar í skúlanum.

# Gøta og Leirvík ætla at leggja saman

**Tosað hevur verið í eina tíð um møguleikarnar fyri samanlegging millum grannakommunurnar, Gøtu og Leirvík, og nú er málið so komið har til, at bygdaráðini ætlandi taka endaligu avgerðina um vegleiðandi fólkaatkvøðu mánakvøldið**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á bygdaráðsfundi mánakvøldið fara kommunustýrini í Gøtu og Leirvík at viðgera eitt tilmæli, sum fíggjarnevndirnar hjá kommununum hava gjørt um at útskriva vegleiðandi fólkaatkvøðu um samanlegging millum Gøtu kommunu og Leirvíkar kommunu.

Fundurin í Gøtu verður klokkan 18 og í Leirvík klokkan 19.

Tilmælið byggir á, at kommunurnar verða lagdar saman frá 1. januar 2009 at rokna, og navnið á nýggju kommununi – um meiriluti er fyri samanlegging í Gøtu og Leirvík – verður Eysturkommunan.

Tosað hevur verið í eina tíð um møguleikarnar fyri samanlegging millum grannakommunurnar, Gøtu og Leirvík, og nú er málið so komið har til, at bygdaráðini ætlandi taka avgerðina um vegleiðandi fólkaatkvøðu mánakvøldið.

Høvuðsgrundgevingarnar fyri samanleggingini eru –

1) at kommunurnar skulu gerast betri førar fyri at veita borgarunum eina góða tænastu

2) at samskipa umsitingina og raksturin av kommununum

3) at kommunurnar eru betur førar fyri at taka av nýggjum avbjóðingum í framtíðini

4) at samskipa íløgurnar, so at betri nytta fæst burtur úr íløgum – og at forða fyri óneyðugum íløgum

5) at skapa betri karmar fyri øktum virksemi í økinum

Sambært tilmælinum verður kommunala fyrisitingin hjá Eysturkommunu ætlandi í Norðragøtu.

# Kirkjan kann yvirtakast um eitt ár

Samráðingarnar millum føroyingar og danir á embætismannastigi vóru fyrr í vikuni. Partarnir eru komnir ásamt um allar tættir, so greitt er at yvirtaka fólkakirkjuna. Mikudagin var fundur í Keypmannahavn um yvirtøku av fólkakirkjuni. Samráðingar hava verið í fleiri umførum, og nú eru øll viðurskifti í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni komin undir land.

Danski kirkjumálaráðharrin, Bertel Haarder, og Jógvan á Lakjuni fara í næstum at skriva undir eina yvirlýsing, sum staðfestir, at samráðingarnar eru at enda komnar. Hetta merkir aftur, og klárt er hjá føroyingum at yvirtaka fólkakirkjuna.

**sb.**